Fríggjakvøldið kl. 20.30

Fólk og móti



Annar partur í sendiroðini um mótafólk kemur í kvøld. Vit hitta Jean Louis Scherrer, sum greiðir frá menniskjum ogklædnamóta í 1984. Á myndini sæst mótamaðurin sum fórir fram eina av modellunum, sum er ílatin eftir hansara tykki.

Fríggjakvøldið frá kl. 21.05 til 22.25:

Montreux-vinnararnir 1984



Í trimum fylgjandi sendingum verða vinnararnir í Montreux kappingini 1984 vístir fram við sendingum teirra, ið gjørdu úrskurðin á Montreux-festivalini í ár.

Kappingin fer fram á tann hátt, at hvørt sjónvarpslandið sær sendir eina upptøku til Montreux at kappast.

Sjónvarpið í Belgia vann bronsurósuna fyri sendingina »Musicomicolor«. Hetta er tónleikasending, har ein violin, harmonika og obo tónleikaljóðfori hava høvuðsleiklutin. Ljóðførini verða myndað á tann hátt, at eitt er skemtiligt, annað er óvætti og tað triðja ljóðfori skal mynda smæðni. Samstundis verða hesi fyribrigdi viðgjørd við dansi, sangi og tónleiki.

Kl. 21.35

»Raw War«

Tað var finska sjónvarpið sum vann silvurrósuna við sendingini »Raw War«. Hetta er filmur við skemti av serligum slag, um eitt nú tá finnar, sum eru uttanveltaðir, óttaleysir hitta figgindan.

Kl. 22.00

»I am a Hotel«

Gullrósuna vann sjónvarpið í Kanada í Montreux kappingini. Tað er tónaskaldið Leonard Cohen, sum hevur skipað sendingina í orðum og løgum. Hetta er skaldslig sending við dreymakendum og dramatiskum innihaldi. Ein fastbúgvandi maður á gamla hotellinum upplivir sína egnu og aðrar lagnur, sum hava búð á hotellinum gjøgnum tiðirnar.

Fríggjakvøldið kl. 22.25

Lítla spøkilsi



Hetta er sending í røðini Lagnusøgur, sum bretska sjónvarpið hevur gjørt.

— Eg skal siga tygum, at eg orki ikki fyri børnum, tey larma so illa . . .

Tað er Garvin, sum sigur hesi orð í filminum, tá hann skal skaffa sær innivist at arbeiða í. Hann skal skriva eina bók. Treytin fyri, at hann vil leiga hølið, er, at eingi børn eru nærindis. Tað vissar verturin leigarin um, men fyrstu náttina - Garvin er innfluttur, hoyrir hann barnagrát. nógv kemur fram, sum krevur viðgerð. Tí er umnátt hoyrir hann barnagrát, men hann finnur ongantíð barnið!

Søgugongdin er skrivað at fara fram í ár 1927.


sjónvarp

Hósdagin 20. september

20.00 **Ítróttur**

Fríggjadagin 21. september

19.30 **Kemir úr Nigeria 1**
20.00 **Dagur og vika**
20.30 **Fólk og móti.** Montreuxvinnararnir 1984
21.05 **Musicomicolor**
21.35 **Raw War**
22.00 **I am a Hotel**
22.25 **Lítla spøkilsi** — en. SV-leikur
23.20 **Liðugt**



Dreymar og gerandisdagar

Byrjunarmyndirnar í barnasjónvarpinum eru tær bestu við hesi sending, tí tær eru serstakliga føroyskar í sínum uppruna. Roynd in at gera føroyskan tekst og frásøgurødd var væleydnað við filminum »Sjómaðurin«, bert tóktist tað løgið, at sjálvt heitið á filminum ikki var umsett. Tað var tó bert eitt orð, og hetta var tó heitið á tí, sum børnini skuldu siggja.

»Sjómaðurin« er serligur barnafilmur, sum er ætlaður at senda í fleiri londum. Av hesum er teksturin gjørdur soleiðis, at tað ber væl til at umseta til ymisk mál.

Eisini hesaferð var »Dagur og vika« fjølbroytt, tó at sendingin bar dám av, at løgtingið er saman, eins og at tú hómar, at valstrið er fyri framman. Hesaferð vóru eisini minningarorð um Leon Joensen. Tað tykist eitt sindur ósømiligt, at vísa livandi myndir av manni, sum júst er deyður. Aðrastaðni er tað mest nýtt at nýta eina fasta mynd ella fleiri, um slíkar myndir eru tøkar.

Í sendingini SV-aktuelt hesaferð sóu og hoyrdu vit enn einaferð um hungursneyð og neyðstøðuna, ið ræður í hesum og øðrum londum. Enn einaferð spurdu tey neyðstøddu, hvi hjálpin ikki kundi gevast í sáð og øðrum tilfari, so fólk sjálvi kundu arbeiða seg á føtur aftur. Vesturlond lata her matvørur ókeypis ella til dumpingprísir. Tað myndar seg sum undirgravingarvirksemi, — sæð frá framleiðsluliðinum í londunum.

Sjónvarpsfilmurin um »Jammersminde« og søguna hjá Eleonoru Christinu var leiklist á hægsta stigi. Bodil Ipsen megnaði til fulnar at geva hesum søguliga persóni liv og styrki, so ein í dag rættiliga kann skilja umstøðurnar hjá Eleonoru Christinu og stóra persónleika hennara, at hon megnaði at sita í fangatippi í 21 ár, nýggju mánaðar og 11 dagar, og kortini tá hon at enda sleppur út aftur, ikki er niðurundirkomin og kúgað av upplivinigum sínum.

Enski filmurin um lastbilførararnar, sum koyrdu til og frá hvør sínum heimbýi til annan, har teir lutfalsliga skifta ham, tá teir eru á útivølli, var framúrskarandi í sini avdúkan, hvussu menniskju hava tveir leiklutir í livinum, tann veruliga og so hin, sum einstaklingurin sjálvur ímyndar sær, — átti at verið.

Serliga áhugavert var at siggja, at tá hjúnini høvdu prátað saman eitt stórt áramál, so var eins og evnini uppbrúkt. Tey tosaðu tómt og lurtaðu ikki eftir, hvat hin parturin segði. Ikki so løgið, tá tú var vitni til tómleikan í orðum teirra. Hjúnini hvør sær, høvdu júst kroyst hvønn annan í eitt livsmynstur, har veruleikin var gjørdur til lygn og lygnin til veruleika.

Gerandisdagurin var vorðin fótatrað sum fráleið, og leiðiliga fábroytti arbeiðsdagurin nýttur til at ímynda sær, hvussu øðrvísi kundi verið.

Til tess at geva ímyndini liv, noyddist ein persónur at vera tøkur, sum við áhuga tímdi at lurta eftir, so lygnin gjørdist eitt slag av veruleika. Serliga smart gjørt, at lastbilførararnir rendu seg inn í júst konurnar hjá hvørjum øðrum. Hervið var spenningurin eisini hildin uppi. Gekkaskortarnir fullu tó í síðsta parti, har hjúnini hittust, at halda frí eitt vikuskifti á gistingarhúsi. Áhugavert hevði verið, at fingið innlit í, hvussu hatta vikuskiftið myndaði seg. Tað var júst eisini hæddin í leikinum, at hann endaði har.

Dagny Joensen